*Oljusamstarv um kommunumark:*

# Vágoyggin og Suðuroyggin vilja samstarva innan oljuvinnu

*Kommunurnar í Vágum og í sunnaru helvt av Suðuroynni hava nú tikið stig til eitt samstarv í sambandi við eina møguliga oljuvinnu her á landi. Avgjørt er at seta Suna á Dalbø, sum hevur útbúgving frá lærda háskúlanum í Álborg og sum halgaði nettup oljumálinum sína høvuðsuppgávu, í starv sum ráðgevi hjá „Suður-Vestur Samtakinum", sum nýggja samstarvið verður kallað.*



*Suni á Dalbø, cand. scient soc. frá Álborg Universiteti gjørdi høvuðsuppgávu sum snúði seg um eina møguliga føroyska oljuvinnu og tey multinationalu oljufeløgini. Nú er hann settur at ráðgeva føroyskum kommunum, sum kundu hugsað sær samstarv í sambandi við eina komandi oljuvinnu.*

Sáttmáli um vinnulivsráðgeving er frá 1. des. gjørdur millum Suna á Dalbø og »Suður-Vestur Samtakið/ South West Alliance«, ið er samtak myndað av Felagskommununi í Vágum og kommununum í Suðuroyar sunnaru helvt. Sáttmáli er fyribils gjørdur fyri 13 mánaðir.

Suni á Dalbø hevur samfelagsfrøðiliga kandidatútbúgving (cand. scient. soc.) frá »Aalborg Universitet« í Danmark, harafturat hevur hann lokið ein part av útbúgving síni í Bretlandi og annan í USA. Suni á Dalbø hevur serkunnleika innan »Oktsmennan í altjóða høpi« (altjóða viðurskifti) og almenna um- & fyrisiting.

Tann spurningur ið tykist at hava upptikið føroyingar eina mest tey seinastu árini er spurningurin um ein møguligan komandi oljuvinnu er »bjargingin« fyri Føroya fólk. Hesin áhugin hevur tó ikki fingið føroyskar kommunur, økir ella oyggj at til at taka stig til eina ítøkiliga fyrireiking/ætlan í hesum sambandi.

Fyri at bøta um hesi viðurskifti varð ein arbeiðsbólkur settur av Felagskommununi í Vágum á vári '94. Hesin »oljubólkur« undirstrikar í tilmælum sínum frá mai '95, at tann praktiski parturin í eini tílíkari ætlan er av alstórum týdningi og varð tað tí tilmælt, at eitt »gagn« (skrivstova, sekretariat) tók sær av hesum. Tað er í hesum høpi at nýstovnaða samstarvið millum kommunurnar skal síggjast. Tað verður uppgáva ráðgevans, at røkja tær uppgávur, ið tengdar eru at skipa fyri vinnuligum virksemi, sum skal tryggja kommununum í suður-vesturøkinum ein rímiligan part av einum møguligum ágóða frá eini komandi oljuvinnu.

Undirskrivað avtaluna hava

Umboð fyri vesturøkið Marianna Simonsen, Eivind Jacobsen, umboð fyri suðurøkið Jógvan Krosslá, Gudmund Jacobsen og Suni á Dalbø, ráðgevi.



*Fyrsta og higartil einasta útlendska supplyskipið, sum hevur verið í Føroyum koma á Vág herfyri við útgerð til boriplássið í Lopra. Mynd Rógvi Johansen*


# Missiónssangbókin

**Nýggja sangbókin**
**hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum**
**og Kirkjuligu Heimamissiónuni**
**verður til keyps í handlunum**
**17. desember.**

**Kostnaður kr. 185,- og 120,-**

***Bókin verður seld á hesum støðum:***

*Norðoyggjar:*
Alfa bókhandil, Klaksvík
Bókabúðin Fløvin, Klaksvík

*Eysturoy:*
Bóka- & Pappírshandilin, Runavík
Jólasølan hjá HMF, Runavík
Oliver Øster, Eiði
Stranda Centrum, Strendur

*Vágoy:*
Hjá Peturi, Sandavágur
F.K. Miðvágur

*Streymoy:*
Bókasølan, SMS
H.N. Jacobsens bókhandil
Hjalmar Jacobsens bókhandil
Luthers bókhandil
Sigurd Nielsen, Vestmanna
Leguhúsið í Nesvík

*Sandoy:*
Eldhús, Sandur

*Suðuroy:*
Heimavirkið, Vágur
Z. Müller, Porkeri
John Hammer, Tvøroyri

**HEIMAMISSIÓNSFORLAGIÐ, TLF. 22533**